# Føroyingar stóðu seg væl

**2nd Atlantic Weekend er av, og millum føroysku luttakararnar stóð John Arni Nilssen seg best við sínum fimta plássi.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*


*John Arni Nilssen stóð seg best av føroysku telvarunum í talvkapping um vikuskiftið*

Í fjør leiktu umleið 25 telvarar við í kappingini, og í ár var luttakaratalið tvífalt. Góðu virðislønirnar frá Atlantic Airways, umframt góð marknaðarføring, gera sjálvsagt sítt til at luttakaralistin er somikið vælljóðandi.

Føroyingurin Arild Rimestad skipaði fyri kappingini, og hesum kom hann væl frá. Eisini hevur hann á eina hond fingið stuðulsavtalur. Næsta ár er ætlanin at kappingin skal telvast í Føroyahúsinum. Í ár varð telvað í Østerbro, í felagshúsinum hjá Skakforeningen Øbro.

### Føroysku avrikini

Vinnararnir av kappingini vórðu GM Carsten Høi og David Bekker-Jensen við sjey stigum av níggju møguligum. Teimum næstir vórðu IM Kopylov úr Ukraina og Thorbjørn Bromann við 6,5 stigum. Síðani deildu John Arni Nilssen og Simon Bekker-Jensen fimta pláss við 6 stigum.

John Arni legði væl út og var á triðja plássi undan næstseinasta talvinum. Men GM Høi bleiv banamaður hansara, tíverri. John Arni reistist tó, og vann eitt gott og stutt talv í seinasta umfarinum. Sjálvur tyktist hann vælnøgdur við úrslit sítt, sum gav honum nøkur ratingstig í sekkin. Hann nærkast nú 2400.

### Endaliga støðan (hjá føroyingum):

| | | |
|---|---|---|
| 1-2 | GM Høi | 7 |
| 1-2 | David B. Jensen | 7 |
| 5 | John Arni Nilssen | 6 |
| 7 | Ólavur Simonsen | 5,5 |
| 7 | Martin Poulsen | 5,5 |
| 7 | Eyðun Nolsøe | 5,5 |
| 13 | Heini Olsen | 5 |
| 13 | Hans K. Simonsen | 5 |
| 13 | Miriam Olsen | 5 |
| 32 | Finnbjørn Vang | 3,5 |

Sum tað sæst vórðu teir flestu føroyingar væl við í gongdini. Ólavur var undan seinasta talvinum á deildum triðja plássi, men tapti ímóti IM Kopylov sum gav honum eitt hóast alt flott sjeynda pláss. Ólavur vann sær væl av rating eftir hesa kapping.

Eisini Martin, Eyðun og Heini høvdu kjansir undan seinasta talvinum, men javnleikur millum júst Martin og Eyðun og eitt tap hjá Heina, steðgaði teirra royndum at koma í topp 5. Martin og Eyðun telvaði væl. Vórðu sindur svingandi til tíðir, men sum heild vóru teir nøgdir við síni avrik.

Føroyameistarin, Hans Kristian Simonsen, hevði eina undir miðal kapping. Hann fekk onga ynskibyrjan, og sostatt ongantíð nakran møguleika at blanda seg í toppin.

Endaliga støðan lúgva eitt petti, tí eitt nú møtti Heini Olsen nógv sterkari mótstøðu enn Miriam, sjálvt um tey fingu bæði fimm stig. Men kortini skal sigast at Miriam av álvara er vorðin ein sterkur telvari, og hevur nú umleið 1900 í rating.

### Tann føroyska byrjanin?

Í talvi eru allar byrjanir kallaðar upp eftir øllum ymiskum, eitt nú hava vit tí italiensku byrjanina, tí hollendsku o.s.fr. Men enn er eingin »føroysk byrjan« (nevnast skal at IM John Rødgaard hevur fingið ein variant í fronsku byrjanini uppkallaðan eftir sær, »Rødgaard variation«).

Man kann tí skemtandi taka til at føroyameistarin Hans Kristian Simonsen, møguliga verður upprunamaðurin til nýggju byrjanina, tann »føroyska byrjanin«. Í síðsta umfarinum leikti hann nevliga soleiðis við hvíta fólkinum: 1. Rif3 d5 2. Rig1??!!. Hann hevði framanundan avgjørt at telva hetta talv á ein skemtandi hátt. Seinni í talvinum hoppaði sami riddari eisini aftur og fram á g1-e2 puntunum.

Sjálvt um Hans Kristian loksins vann talvið, ja so eiga nýbyrjarar og telvarar sum heild als ikki at læra av hesum. Byrjanarleikirnir hjá Hans Kristiani, kunnu á talvmáli kallast sera ósunnir og tempotap. Men viðgangast má, at stuttligt varð tað kortini at sjáa talvið.

**Ólavur Simonsen (2208) – Lyubov Kopylova (2219)**
*Atlantic Weekend (8. umfar), 12.05.2002*

1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.c3 Rif6 4.Be2 Ric6 5.d4 cxd4 6.cxd4 Rixe4 7.d5 (Ólavur í eyðkendum stíli, við finnu minni fyri aktivt spæl) 7...Fa5+ 8.Ric3 Rixc3 9.bxc3 Rib8 10.0-0 Rid7 11.Re1 Rif6 [11...Fxc3 er møguliga rætti leikurin, men hvítur fær kortini eyka góða tíð at útvikla seg.] 12.Fb3 Bd7 13.Rid4! Rc8 14.Bb5 Fxc3? Rxc3 (er einasti leikur, sum gevur svørtum møguliga betri kjansir) 15.Bxd7+ Rixd7 16.Fxc3 Rxc3 17.Rib5! Rxc1 (tað einfalta er Raxc1, men Òlavur leitar annan leik fram sum bæði er mergjaður og vinnur forserað) DIAGRAM 18.Rixd6+! Kd8 19.Rixf7+ Ke8 20.Raxc1 Kxf7 21.Rc7 Rif6 22.d6 (talvið er avgjørt) 22...Kg6 23.dxe7 Bxe7 24.Rexe7 Re8 25.Rxg7+ Kh6 26.h3 Re2 27.Rxb7 Rxa2 28.Rxa7 Rd2 29.g4 1-0 áðrenn Rid6

# Atkvøð fyri Heidi


*Heidi Andreasen hevur fingið nógvar atkvøður á heimasíðuni hjá Laureus*

ATKVØÐUGREIÐSLA
*Stefan í Skorini*

Í dag, týsdagin, verður gjørt av, hvør skal gerast ársins ítróttarfólk í heiminum við breki. Sum kunnugt er Heidi Andreasen millum tey innstillaðu til hesa virðislønina.

Tað er felagsskapurin Laureus World Sports Awards, sum skipar fyri, og á heimasíðuni á internetinum ber til hjá tær at atkvøða fyri tí, sum tú heldur skuldi fingið henda heiðurin.

Mánadagin á middegi hevði Heidi Andreasen fingið 93,73 prosent av atkvøðunum á heimasíðuni. Tó fekst ikki at vita, hvussu nógv fólk høvdu atkvøtt.

Adressan, har fólk kunnu greiða atkvøðu er á www.laureus.com/awards/voting/.



# World Pilot Gig Championships á Scilly

**Við ikki sørt av trupulleikum fóru manningarnar á ávíkavist Havnarbátinum og Páll Fanga til Scilly oyggjarnar týsdagin 30. apríl til heimsmeistaraskapin í Gig róðri. Í bakandi sól róðu vit kapp móti úti við áttati øðrum á Scilly oyggjunum**

SCILLY 2002
*Solby A. Eliasen*



*Spenningur var í róðrinum um at vinna B bólkin hjá kvinnunum*

Eftir ætlan skuldi kvinnumanningin ikki fara úr Klaksvík fyrr enn týsmorgunin, men orsakað av verkfallinum gjørdu vit av at fara longu mánakvøldið. Og gott tað sama, tí stutt eftir, at vit vóru komnar til høvuðsstaðin, fingu vit boð um, at farast skuldi úr Havn klokkan hálvgum seks morgunin eftir. RSF hevði frætt, at vandi var fyri at Vágoyggin fór at verða blokerað. At hon so kortini ikki bleiv blokerað er ein heilt onnur søga.

Ferðin til st. Mary´s, sum er ein av oyggjunum á Scilly, var sera drúgv - drúgvari enn hon átti. Ferðaleiðarar vóru Hans Dávid Hansen og Terje Kjærbo, men tað var so ikki teirra skuld, at ferðin bleiv so drúgv. Flogið varð úr Føroyum til Kastrup og so víðari til London, Gatwick. Síðani skuldu vit við náttartoki til Penzance í Lands End. Hetta gekk alt upp á stás, tó so vit vóru sera troytt, tá vit komu hartil umleið klokkan hálvgum átta morgunin eftir. Men troystin var, at nú vóru bert knappir tríggir tímar við ferju eftir.

### Ferjan sigldi ikki

Men hvat? Ferjan hevði havt trupulleikar kvøldið fyri, og sigldi ikki aftur tann dagin. Hon siglir bert eina ferð um dagin. So vit máttu flúgva yvir til oyggjarnar. Flúgvararnir taka ikki nógv fólk. Onkrir tóku einans átta, meðan aðrir tóku upp til sekstan. Eisini spældi viðførið ein stóran leiklut. Um tað vigaði ov nógv, so tók flúgvarin færri fólk.

Vit vórðu biðin um at fara umborð á ferjuna at bíða eftir nærri boðum. Tað tók langa tíð, men tey avbera fryntligu og hjálpsomu starvsfólkini gjørdu alt tað tey kundu fyri at bera so skjótt at sum møguligt.

Flúgvitúrurin tók einans tjúgu minuttir, men sum sagt, so var tað sera drúgt at bíða. Tað komst av at ferðafólkini, sum skuldu havt verið við ferjuni, máttu bíða eftir plássum í flúgvarunum. Og óivað vóru fleiri eyka flogfør sett inn henda dagin.

Tá øll langt um leingi vóru komin upp á pláss, var farið at hyggja eftir bátinum, sum rógvast skuldi í. Hetta slagið av bátum verður kallað gig. Og The Faroese Partnership hevði stuðlað eina nýggja gig til eitt róðrarfelag á st. Mary´s, sum eitur Mewagissey Rowing Club. Kerens eitur hon. So spenningurin at síggja hetta snøgga far var stórur. Og flott var hon. Stóð á einum flata, sum eitur Holgates Green. Farið varð beinanvegin at venja og tað gekk so hampuligt, men vit skuldu tó líka venja okkum við tann nýggja bátin. Eisini tók veðrið fleiri av okkum á bóli. Aldurnar vóru sera stórar, nógv størri enn tað man er vanur við at venja í her á klettunum, so illa gekk tann fyrsta dagin. Serliga hjá kvinnumanningini. Men dagin eftir var betri og tá vandu vit eisini tvær ferðir. Ringa veðrið hevði eisini við sær, at rógvararnir mistu nógv tøk, tí vit ikki eru von við at skula hyggja út á árina alla tíðina. Í Føroyum er tað nógva staðni nærum bannlýst at hyggja út úr bátinum, meðan róð verður.

Vit fóru so eisini ein lítlan venjingartúr fríggjamorgunin, áðrenn farið varð á eina útferð til tvær av hinum oyggjunum: St. Martin´s og Tresco. Á Tresco vóru vit og vitjaðu ein vakran hava, sum eitur Abbey Garden. Ein einastandandi vakur havi, við alskyns blómum og trøum. Hann líktist nógv einum tropiskum hava við teim mongu pálmunum. Haðani gekk so leiðin til st. Martin´s, sum er ein onnur vøkur oyggj har um leiðir.

Fríggjakvøldið vóru so tvær kappingar, Veteran´s Race og Truro Trophy Race. Ta fyrru kappingina høvdu vit ikki møguleika til at síggja, men vóru øll og hugdu at tí seinna. Róð varð frá St. Agnes til St. Mary´s, sami teinurin, sum tann innleiðandi róðurin hjá okkum fór at vera dagin eftir. Umleið 3.000 metrar. Her fingu vit ein lítlan forsmakk upp á startin, sum í øllum førum ikki kann sametast við tann føroyska. Í staðin fyri startskotið, sum nýtt verður í Føroyum, nýta tey á Scilly bert eitt flagg, sum verður koyrt upp fyri at vísa, at nú verður tað skjótt, og sum síðani verður koyrt niður, sum boð til bátarnar, at nú skulu tit rógva. Og tá flaggið fór niður hetta fríggjakvøldið, er tað synd at siga at bátarnir lógu eftir einari linju. Nei! Onkrir vóru meira enn eina bátslongd aftanfyri.

Tá bátarnir vóru komnir inn um málstrikuna, var greitt at ein av teim lokalu bátunum vann. Idas ætt hann. Føroyingarnir fóru vælhýrdir aftur á hotellið og nýttu restina av kvøldinum til at slappa av í og fyrireika seg til stóru avbjóðingina dagin eftir.

*Framhald á síðu 28*


*Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess í Føroyum var niðri á Scilly og hugdi at róðrunum*